# Innihald


1. Fororð. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3

2. Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
2.2 Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
2.3 Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
2.3.1 Eftirlit og heimildir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

3. Virksemi í árinum 2008 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
3.1. Átak á fólkaskúlunum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
3.2. Eftirlitsvitjanir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
3.3 Hagtøl fyri 2008 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
3.4 Munnligir fyrispurningar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
3.5. Loyvir og fráboðanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
3.5.1 Loyvi til verkætlanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
3.5.2 Verkætlan: Antimicrobial resistance in Streptococcus pneumoniae, Streptococcus pyogenese and Escherichial coli from the Faroese population, correlation with antimicrobial use and comparison with Denmark and Iceland 14
3.5.3 Verkætlan: Kanning av stress millum føroyskar fólkaskúlalærarar . . . . . . . . . 15
3.5.4 Verkætlan: Nøgdsemiskanning av Heilsufrøðiskipanini . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
3.5.5 Verkætlan: „Misbrug af stoffer blandt unge". . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
3.5.6.Verkætlan: Kvantitiv kanning millum mammur í Føroyum, sum hava átt ov tíðliga . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
3.5.7. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum. . . . . . . . . . 16
3.5.8. Ílegusavnið (8 fráboðaðar granskingarverkætlanir) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
3.6. Hoyringar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
3.6.1. Lógaruppskot . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
3.6.2. Kt-politikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17

4. Ávís útvald mál í 2008 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
4.1 Ymisk mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
4.1.1 Vakmyndatól á úti- og náttarstøðum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
4.1.2 Innlit í tryggingarmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

4.1.3. Dátugrunnurin www.kjak.fo ........ 22
4.1.4 Høvdavirkið í Leirvík. ........ 23
4.1.5 Bandaðar telefonsamrøður ........ 26
4.2. Mál tikin upp av egnum ávum ........ 27
4.2.1. Vevmyndatól. ........ 27
4.2.2. Vakmyndatól ........ 29
4.2.3. Støð við skeinkiloyvi. ........ 29

5. Altjóða samstarv ........ 31
5.1. Norðurlond ........ 31

6. Eftirlitsvitjanir í 2008 ........ 33
6.1. Eftirlitsvitjan við vakmyndatólum ........ 33
6.2. Eftirlitsvitjan hjá Barnaverndarstovuni. ........ 34
6.3. Eftirlitsvitjan hjá Deildini fyri arbeiðs- og almannaheilsu (DFAA) ........ 34
6.4. Eftirlitsvitjan hjá Fiskimálaráðnum. ........ 35

Ársfrágreiðingin 2008 hjá Dátueftirlitinum
Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent

# 1 Fororð

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2008 úr hondum.

Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2008. Dátueftirlitið hevur merkt ein øktan áhuga fyri økinum og nevnast kann m.a., at talið á munnligum fyrispurningum er vaksið við 97 % í mun til árið frammanundan.

Dátueftirlitið hevur hetta árið valt framhaldandi at varpa ljós á børn og ung og internet. Í samband við bóklingin **Tað er tín avgerð**, sum varð gjørdur í fjør, hevur Dátueftirlitið í ár verið á vitjan á 22 fólkaskúlum kring landið. Vitjað varð á øllum fólkaskúlum, sum hava framhaldsdeildir og Dátueftirlitið hevði framløgur av ymiskum evnum, sum verða viðgjørd í bóklinginum, og sum knýta seg til ung og internet- og fartelefonnýtslu teirra. Á vitjanunum fekk Dátueftirlitið gott samskifti við tey ungu, sum vóru sera áhugað og høvdu nógvar góðar spurningar um evnini í bóklinginum.

Eisini eftirfylgjandi hava nógv børn og ung vent sær til Dátueftirlitið við spurningum, serliga um sosialu netverkini Arto og Facebook.

Eins og undanfarna ár er nógv orka brúkt til mál um vakmyndatól, bæði um fráboðanir um vakmyndatól og spurningar annars um nýtslu av vakmyndatólum. Dáturáðið viðgjørdi í árinum nøkur prinsipiel mál um vakmyndatól á náttarstøðum og hevur nú tillagað ein praksis á hesum økinum.

Í 2008 var Dátueftirlitið á eftirlitsvitjan fyri fyrstu ferð í 4 ár. Hetta gjørdist veruleiki, eftir at Løgtingið hevði hækkað játtanina hjá Dátueftirlitinum, so at Dátueftirlitið kundi keypa sær serkøna hjálp til at fremja tekniskt eftirlit. Dátueftirlitið framdi á heysti 8 eftirlitsvitjanir hjá bæði almennum myndugleikum og privatum fyritøkum. Á eftirlitinum vórðu staðfest fleiri ófráboðað vakmyndatól eins og komið var fram á onnur viðurskifti, sum ikki vóru í samsvari við lógina.

Dátueftirlitið luttók somuleiðis á árliga felags norðurlendska málsviðgerafundinum, sum í 2008 varð hildin í Stokholm.

Væntað varð, at 3. lands góðkenningin frá ES fór at koma í 2008, men bíðað verður framvegis eftir hesum máli.

Tórshavn, 14. juli 2009
Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum
Ingunn Eiriksdóttir, stjóri í Dátueftirlitinum

# 2 Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært lógini eru fyrisitingarliga endaligar.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýrismanninum í lógarmálum, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

LIMIRNIR Í DÁTURÁÐNUM 2008-2012:
Landsstýriskvinnan í innlendismálum valdi tann 1. november 2008 somu limir í Dáturáðið eitt valskeið afturat. Samstundis eru nýggir varalimir valdir.
Í Dáturáðnum eru:
Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna.
*Varalimur Aibritt á Plógv, løgfrøðingur.*
Bjarni Wilhelm, fíggjarleiðari.
*Varalimur Annika Sølvará, stjóri.*
Óli M. Hansen, løgfrøðingur.
*Varalimur Regin W. Dalsgaard, stjóri.*

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er 4 ár og gongur út 1. november 2012.

SKRIVSTOVAN:
Stovnurin er skipaður við einum stjóra, einum løgfrøðingi og einum skrivara.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum, bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2008 var: **kr. 1.890.000 kr.**

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2006-2008.

## FÍGGJARJÁTTANIN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM FYRI 2006-2008

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|
| | **J+EYJ** | **J** | **J** |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **1.262** | **1.707** | **1.890** |
| Lønir o.a. | 1.000 | 1.400 | 1.453 |
| Keyp av vørum og tænastum | 126 | 168 | 298 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 100 | 102 | 102 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 36 | 37 | 37 |

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2008 vóru hesar reglur galdandi:**
Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).

Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).

Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 70 frá 2. juli 2007.

Kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Kunngerð nr. 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 72 frá 2. juli 2007.

Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.

Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Innlendismálaráðnum tann 18. juni 2008.

## 2.3. UPPGÁVURNAR HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

### 2.3.1. EFTIRLIT OG HEIMILDIR

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til

øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

Í 2008 var játtanin hjá Dátueftirlitinum hækkað, so at Dátueftirlitið nú kann fremja tekniskt eftirlit við útlendskum konsulentum. Dátueftirlitið var í 2008 á 8 eftirlitsvitjanum, sí pkt. 6 í ársfrágreiðingini.

# 3 Virksemi í árinum 2008

Dátueftirlitið hevur í 2008 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt klagur frá persónum um ymiska viðgerð av persónsupplýsingum
- framt 8 eftirlitsvitjanir
- vitjað og hildið framløgur fyri 22 fólkaskúlum kring landið
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum
- luttikið í norðurlendskum samstarvi
- samskift við ymiskar myndugleikar í samband við 3. lands góðkenningina frá ES.

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg og nýggir trupulleikar og øki stinga seg javnan upp. Somuleiðis er lóggávan lutfallsliga nýggj, og tískil er neyðugt at menna nýggjan praksis á økinum og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari tøkniligari menning, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2008 serliga verið um hesi evni:

- vakmyndatól,
- vevmyndatól,
- telefonskráseting,
- viðurskiftini millum arbeiðsgevarar og starvsfólk í mun til internetnýtslu,
- loyvi til verkætlanir og ymiskar kanningar,
- sosial netverk, og
- p-talið.

### 3.1. ÁTAK Á FÓLKASKÚLUNUM

Í 2008 var Dátueftirlitið á øllum teimum 22 fólkaskúlunum í Føroyum, sum hava framhaldsdeild, og greiddi næmingunum frá bóklinginum „Tað er tín avgerð". Bóklingurin varð gjørdur í 2007 í samstarvi millum Dátueftirlitið, KT-depilin og Føroya Tele og er serliga ætlaður skúlanæmingum í framhaldsdeildunum. Á ein lættlesiligan hátt verður í bóklinginum greitt frá ymiskum evnum í sambandi við nýtslu av elektroniskum samskiftismiðlum, herundir hvussu persónsupplýsingar kunnu koma á skeivar hendur og verða brúktar á óhepnan hátt, og hvussu til ber at verja hesar upplýsingar.

Endamálið við bóklinginum er at læra tey ungu at taka avgerðir, sum eru rættar fyri tey, og at læra tey at hava virðing fyri, hvussu hesir nýggju miðlar og møguleikar skulu nýtast.

Tey ungu høvdu stóran áhuga í evnunum í bóklinginum, og Dátueftirlitið kom í góðan dialog við tey ungu, sum settu nógvar góðar spurningar.

Eftirfylgjandi hava nógv børn og ung vent sær til Dátueftirlitið við ymiskum spurningum. Hetta hevur serliga snúð seg sum um ymiskar trupulleikar í samband við sosial netverk so sum Arto og Facebook. Eisini hava fleiri foreldur vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum í hesum sambandi. Eftir ætlan skal hetta vera eitt afturvendandi átak, men av tí at tað krevur nógva orku, er ætlanin, at hetta verður 2. ella 3. hvørt ár.

Dátueftirlitið hevur somuleiðis verið á Føroya Handilsskúla og havt framløgur um evnini í bóklinginum. Eftir ynski frá Føroya Handilsskúla er avtalað, at hetta verður eitt árligt afturvendandi tiltak í september mánað, tá nýggir næmingar byrja. Miðað verður ímóti at fáa slíkar avtalur við allar miðnámsskúlarnar.

Ein flokkur av næmingum av Kambsdali vóru av egnum ávum og vitjaðu Dátueftirlitið og fingu frágreiðing um evnini í bóklinginum.

### 3.2. EFTIRLITSVITJANIR

Í døgunum 29. og 30. oktober 2008 framdi Dátueftirlitið eftirlit hjá 8 almennum og privatum stovnum og fyritøkum í miðstaðarøkinum. Eftirlitið varð gjørt hjá 5 privatum fyritøkum, 2 almennum stovnum og einum aðalráð og var fráboðað frammanundan.

Eftirlitsvitjanirnar hjá teimum 5 privatu fyritøkunum snúðu seg um at kanna eftir, um reglurnar um vakmyndatól vóru hildnar, herundir fráboðanarskyldan, meðan eftirlitið hjá teimum almennu myndugleikunum í stóran mun snúði seg um kt-trygd og í einum føri serliga um trygdina í samband við viðgerð av starvsfólkaupplýsingum.

Eftirlitið varð gjørt av tveimum starvsfólkum á Dátueftirlitinum og einum eksternum konsulenti, sum hevði tann tekniska førleikan, sum starvsfólkini á Dátueftirlitinum ikki hava og tískil mugu útvega sær uttanifrá. Eftirlit var framt á hesum støðum:

- REX
- ECLIPSE
- HAVNAR KLUBBA
- STATOILSTØÐINI À ARGJUM
- MARCO POLO
- BARNAVERNDARSTOVUNI
- DEILDINI FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU
- FISKIMÁLARÁÐNUM

Á eftirlitinum var staðfest at ymisk viðurskifti ikki vóru nøktandi, og fingu dátuábyrgdararnir boð um at gera ymisk teknisk og fyriskipanarlig tiltøk, sum skuldu tryggja, at reglurnar í persónupplýsingarlógini verða hildnar.

Frágreiðing er skrivað frá eftirlitsvitjanunum og ein stuttur samandráttur av niðurstøðunum

frá eftirlitinum er at finna undir pkt. 6 í hesi ársfrágreiðing. Eisini ber til at lesa frágreiðingina frá eftirlitsvitjanunum í fullum líki á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

### 3.3. HAGTØL FYRI 2008

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í skjalaskránni hjá Dátueftirlitinum fyri 2008, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2008.

Í tíðarskeiðinum 1. janauar til 31. desember 2008 vóru 137 nýggj mál skrásett, og hetta er ein vøkstur uppá 21% í mun til undanfarna ár.

Á mynd 1. niðanfyri sæst, hvussu tey nýstovnaðu málini í 2008 kunnu bólkast.

Málini í 2008 kunnu í høvuðsheitum bólkast á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Fráboðanir og givin loyvir | 44 |
| Norðurlendskt og Altjóða samstarv | 2 |
| Fyrispurningar frá almennum myndugleikum og privatum | 43 |
| Lógaruppskot til hoyringar | 7 |
| Mál tikin upp av egnum ávum | 17 |
| Mál viðvíkjandi kt-trygd | 3 |
| Onnur mál | 21 |

Á mynd 2 á síðu 12 sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar og fyritøkur, málini snúgva seg um.

Málini eru í høvuðsheitum uppbýtt á henda hátt

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 27,5% |
| Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 35% |
| Privatpersónar | 15% |
| Kommunur | 7,5% |
| Annað | 15% |




**MYND 1: Bólking av málum í 2008 í mun til 20007**

**MYND 2: Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t.**




**MYND 3: Málsbýti í mun til evnisbólkar**




Á mynd 3 sæst hvussu málini eru býtt upp á ymsu evnisbólkarnar

Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar í %

| | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 22% |
| Vevmyndatól | 11% |
| Gransking | 12% |
| Starvsfólkaviðurskifti | 6% |
| Kt-trygd | 4% |
| Innlit | 3% |
| Ummæli/hoyring | 18% |
| Mál tikin upp av egnum ávum | 17% |
| Annað | 7% |

**MYND 4: Munnligir fyrispurningar.**
**Málsbýti í mun til myndugleikar, stovnar o.t.**



3.4. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR:
Talið av munnligum fyrispurningum í ár er vaksið við 97% í mun til í fjør.

Í 2007 byrjaði Dátueftirlitið at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vóru avgreiddir umvegis telefon. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgari ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í samband við verandi ella komandi mál.

Á mynd 4 sæst hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vórðu avgreiddir í 2008, kunnu bólkast.

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 29 % |
| Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 28% |
| Privatpersónar | 32 % |
| Kommunur | 6 % |
| Advokatar | 5 % |

*Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.)*
Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, og nær tað er loyvt at lata víðari viðkvæmar persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Somuleiðis hava fyrispurningar verið um at varðveita og almannkunngera ymiskar persónsupplýsingar. Eins og undanfarnu árini hava fyrispurningar verið um p-talið, um samkoyring av upplýsingum, um innlit, um reglurnar fyri heimaarbeiðspláss, voice log og ymisk starvsfólkamál. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkamál hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar úr teldupostskipanini hjá starvsfólki ella aðrar loggupplýsingar um starvsfólk. Í onkrum føri hava fyrispurningar verið um innlegg hjá starvsfólkum á kjaksíðum og har arbeiðsplássið er skrásett sum avsendari.

*Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.)*
Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum og arbeiðsgevarum hava í 2008 snúð seg um vakmyndatól og um viðgerð av persónsupplýsingum í ymiskum starvsfólkaviðurskiftum. Herundir um at eftirkanna heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, um innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, um skráseting av telefonsamskifti hjá starvsfólkum, og um at flyta persónsupplýsingar av landinum. Eisini hava onkrir fyrispurningar hetta árið verið um, hvussu upplýsingar í teldupostskipanum o.ø. skulu handfarast, eftir at starvsfólk eru farin úr starvinum. Nakrir fyrispurningar hava somuleiðis verið í samband við kredittupplýsingarvirksemi.

*Privatpersónar*
Rættiliga nógvir av fyrispurningunum frá privatpersónum hava verið frá starvsfólkum, sum hava spurt um reglur fyri, nær ein arbeiðsgevari kann kanna teldupost og heimasíðunýtslu hjá starvsfólki. Eisini hava onkrir fyrispurningar verið frá starvsfólki, sum eru søgd úr starvi, og sum vilja vita, hvussu arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. Fyrispurningar hava verið um skráseting av persónsupplýsingum í samband við høvuðsuppgávu ella phd-lestur, um ymiskar spurnarkanningar, um ættargransking, um happing á internetinum, um vakmyndatól, um skráseting av upplýsingum í

ARTO og Facebook, og eins og undanfarnu ár hava nakrir fyrispurningar verið um nýtslu av p-talinum.

*Kommunur*
Fyrispurningarnir frá kommununum hava hetta árið serliga verið um vakmyndatól og vevmyndatól, um p-talið og um ymiskt í samband við kt-trygd.

*Advokatar*
Fyrispurningarnir frá advokatum hava í 2008 serliga verið um at geva víðari viðkvæmar persónsupplýsingar, um innlit í arbeiðsrelateraðan teldupost hjá starvsfólkum og um ábyrgd hjá umboðsfólkum.

## 3.5. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

*Viðgerðarloyvi:*
Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvi eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

*Fráboðan:*
Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Tríggjar kunngerðir eru gjørdar við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum eru ikki viðkvæmar, verða viðgjørdar skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um vakmyndatól ella um at flyta persónsupplýsingar av landinum.

### 3.5.1. LOYVI TIL VERKÆTLANIR

Dátueftirlitið hevur í 2008 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

### 3.5.2. VERKÆTLAN:

**Antimicrobial resistance in Streptococcus pneumoniae, Streptococcus pyogenese and Escherichial coli from the Faroese population, correlation with antimicrobial use and comparison with Denmark and Iceland**

Dátuábyrgdari:
Heilsufrøðiliga starvsstovan (Bárður Enni)

Endamál:
Skráseta upplýsingar um persónar, sum eru við í eini granskingarverkætlan hjá Maritu Debess Magnussen.

Háttur:
Royndir verða tiknir av børnum á dagsstovnum við samtykki frá foreldrum, tey verða skrásett við navni, føðingardegi og kontaktupplýsingum. Síðan verða royndirnar skrásettar í LIMS-skipanini. Tá ið royndarinnsamlingin er liðug, verða kontaktupplýsingarnar ikki nýttar, men bert aldur og kyn.

Góðkenning:
Vísindasiðsemisnevndin hevur góðkent verkætlanina á heysti 2008.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið tann 8. januar 2009 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 1. oktober 2011, tá tað skal endurskoðast.

3.5.3. VERKÆTLAN:

**Kanning av stress millum føroyskar fólkaskúlalærarar**
Dátuábyrgdari:
Annbjørg Abrahamsen, Í Kerði, Sumba

Endamál:
Endamálið við kanningini er at máta strongd millum føroyskar fólkaskúlalærarar og máta, um tað er munur á, hvussu strongd ávirkar tríggjar ymiskar arbeiðsbólkar innan skúlaverkið: skúlastjórar, flokslærarar og lærarar. Kanningin er liður í høvuðsuppgávu (Graduate Diploma Dissertation proposal) við Thames Valley University.

Háttur:
Kanningin verður gjørd soleiðis, at lærararnir útfylla eitt spurnarblað, sum er býtt upp í 4 bólkar.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið tann 7. mars 2008 við ávísum treytum.

Verkætlanin var liðug 23. mai 2008, og eru upplýsingarnar strikaðar.

3.5.4. VERKÆTLAN:

**Nøgdsemiskanning av Heilsufrøðiskipanini**
Dátuabyrgdari:
Annemi L. Joensen, J. Broncksgøta 25, Tórshavn

Endamál:
Endamálið við kanningini er liður í masteruppgávu í stjórnmálafrøði

Háttur:
Kanningin verður gjørd við spurnarblaði til kvinnur, sum hava fingið barn í tíðarskeiðnum 1. mars-31. august 2008 og er ein nøgdsemiskanning av heilsufrøðiskipanini við denti á pinkubarnaøkið.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið 27. november 2008 við ávísum treytum.

3.5.5. VERKÆTLAN:

**„Misbrug af stoffer blandt unge“**
Dátuabyrgdari:
Kala Debes, Norðurstíggjur 14, 160 Argir

Endamál:
Endamálið við kanningini er liður í uppgávu í sociologi

Háttur:
Kanningin verður gjørd við spurnarblaði til tveir flokkar í studentaskúlanum fyri at fáa teirra vitan um, hvussu nógv verður brúkt av rúsevnum og hvussu teirra vitan er um fysisku/psykisku árinini.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi varð givið 3. oktober 2008 við ávísum treytum.

3.5.6. VERKÆTLAN:

**„Kvantitiv kanning millum mammur í Føroyum, sum hava átt ov tíðliga“**
Dátuábyrgdari:
Fía, Hjørdis og Vanja, sjúkrarøktarfrøðilesandi Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

Endamál:
At gera eina kvantitiva kanning í sambandi við bachelorverkætlan

Háttur:
Spurnarblað til mammur í Føroyum, sum hava átt ov tíðliga

Viðgerðarloyvi:
Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya hevur tann 2. september 2008 fingið generelt loyvi til at viðgera viðkvæmar upplýsingar við ávísum treytum.

Hetta loyvið umfatar eisini næmingaverkætlanir.

3.5.7. AÐRAR VERKÆTLANIR, SUM IKKI HAVA KRAVT LOYVI FRÁ DÁTUEFTIRLITINUM
Dátueftirlitið hevur í 2008 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Nevnast kunnu m.a. hesar:

20080021:
Kanning hjá Ásu Róin og Hildur við Høgadalsá við heitinum „Føroyskar kvinnur og lívsgóðska“

20080031:
Avtala millum Vinnuhúsið og Granskingardepilin um motivatiónskanning millum løntakarar innan fyri tað privata á landi.

3.5.8. ÍLEGUSAVNIÐ (FRÁBOÐAÐAR GRANSKINGARVERKÆTLANIR)
Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin) og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Dátureftirlitið metir, at heimildin hjá Ílegusavninum í §§ 3-5 og 7 í Ílegulógini til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar eisini fevnir

um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í ítøkiligu verkætlanunum.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, krevst onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá

25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi og hevur hetta við sær, at loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum til ítøkiligu verkætlanirnar hjá Ílegusavninum, men at hesar tó skulu fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið hevur upp á ítøkiligan fyrispurning svarað Ílegusavninum, at mett verður ikki, at tað ber til at gera eina fráboðan, sum fevnir um bæði generellu skipanina og verkætlanir sum heild, orsakað av at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingarlógini. Verkætlanirnar skulu sostatt fráboðast Dátueftirlitnum í hvørjum einstøkum føri.

*Í 2008 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:*

- Forkanningarverkætlan innan hypertrofisk kardiomyopti
- Forkanningarverkætlan innan Parkinson-sjúku
- Forkanningarverkætlan innan anosmi
- Forkanningarverkætlan innan HUS
- Verkætlan um multipel sklerosu
- Verkætlan – Lethal Familial Syndrome
- Forkanningarverkætlan – Landau-Kleffner Syndrome
- Forkanningarverkætlan – Ovarie cancer

## 3.6. HOYRINGAR

### 3.6.1. LÓGARUPPSKOT

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Forslag til lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler.
- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar „lov om anvendelse af tvang i psykiatrien“.
- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar „lov om oprettelse af et centralt dna-profilregister“.
- Lov om værdipapirhandel

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesa kunngerð til ummælis:

- Bekendtgørelse for Færøerne om information til forbrugere om priser m.v i pengeinstitutter.

### 3.6.2. KT-POLITIKKUR

Fleiri almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við kt-trygd og kt-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í 2008 ummælt kt-politikk hjá hesum almennu myndugleikum:

- Kunningartrygdarpolitikkur hjá landsumsitingini
- KT-trygdarpolitikkur hjá Sandavágs Kommunu

Somuleiðis hevur Dátueftirlitið ummælt „uppskot til mannagongdir viðvíkjandi journalskipan og leiðbeining til journalisering fyri kommunurnar“, sum Føroya Kommunufelag sendi Dátueftirlitinum til hoyringar.

# 4. Ávís útvald mál í 2008

4.1 YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verður greitt nærri frá einstøkum útvaldum málum í 2008.

4.1.1. VAKMYNDATÓL Á ÚTI- OG NÁTTARSTØÐUM

Í 2008 eru fleiri fyrispurningar komnir frá privatum fyritøkum um, hvørjar reglur eru galdandi fyri caféir, restaurationir, barrir, dansistøð og líknandi, tá hesi ynskja at nýta vakmyndatól.

Av tí at talan hevur verið um principmál, vóru umboð fyri Dátueftirlitið á fundi við nakrar av eigarunum fyri hesar fyritøkur. Á fundunum kom fram, at endamálið við vakmyndatólunum var at tálma harðskapi, herverki og stuldri og harafturat eftiransan og trygd fyri starvsfólkini. Eisini varð mett, at vakmyndatólini fyribyrgja sølu av rúsevnum.

Málið var eisini fyri á Dáturáðsfundi, sum kom til hesa niðurstøðu:

*„Talan er um úti- og náttarstøð, sum hava opið seint á kvøldi og um náttina og verða mett sum støð, har fólk vanliga kunnu rokna við eitt sindur meira diskretión. Dømi um úti- og náttarstøð kunnu vera barrir, vertshús, cafe'ir, diskotek, dansistøð, matstovur o.l.*

*Úti- og náttarstøð eru eisini arbeiðspláss, har starvsfólk hava krav uppá persónsvernd, og atlitið til persónsverndina hjá starvsfólki vigar tungt á hesum støðum eins og tað ger á øðrum arbeiðsplássum. Harumframt eru hetta støð har fólk koma í síni frítíð, um kvøldarnar og í vikuskiftunum, og mett verður, at tað eigur at bera til at ferðast á hesum støðum eitt sindur meira diskret enn á øðrum støðum, har atlitið til persónsverndina má víkja fyri øðrum atlitum hjá dátuábyrgdaranum.*

*Mett verður, at vakmyndatól eru skerjandi fyri persónliga frælsið og at tað, serliga tá tað snýr seg um úti-og náttarstøð, skal nakað serligt til, áðrenn loyvt verður at nýta vakmyndatól á hesum støðum. Sambært vegleiðingini hjá Dátueftirlitinum um vakmyndatól skulu „heilt serlig trygdaratlit" tala fyri at neyðugt er at hava eftirlit, og vakmyndatól eiga tískil bara at nýtast, um trupulleikin ikki kann loysast á annan hátt. Dáturáðið metir, at vakmyndatól eiga at vera seinasta loysnin á einum trupulleika.*

*Ráðið metir tó, at nøkur atlit kunnu tala fyri at hava vakmyndatól á úti- og náttarstøðum. Hesi atlit eru fyribyrging av stuldri og harðskapi í ein ávísan mun. Í teimum førum har diskretiónsatlitið bæði í mun til viðskiftafólk og persónsverndina hjá starvsfólki vigar minni enn atlitið til fyribyrging av stuldri og harðskapi, kunnu vakmyndatól nýtast í ávísan mun.*

***Niðurstøðan er sostatt, at generel yvirvaking við vakmyndatóli er ikki loyvd á úti- og***

***náttarstøðum, men at ítøkilig avgerð má takast í hvørjum einstøkum føri sbr. § 8 og § 9, stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini***. *Hesar reglur hava við sær, at í hvørjum einstøkum føri skal atlitið til diskretión hjá viðskiftafólkum og atlitið til persónsvernd hjá starvsfólkum vigast upp ímóti atlitinum hjá dátuábyrgdaranum, sum í hesum føri er fyribyrging av stuldri, herverki og harðskapi og sølu av rúsevnum.*

*Í høvuðsheitum kann sigast, at vakmyndatól kunnu nýtast við inngongdina, garderobuna og við diskin. Í meðan vakmyndatól ikki kunnu nýtast við t.d. borðini ella úti á dansigólvinum.*

*Dáturáðið metir tað vera í samsvari við meginregluna í § 8 í persónsupplýsingarlógini, at halda aftur at loyva vakmyndatólum í uppihaldsrúmum á úti- og náttarstøðum, havandi í huga at tað er ivasamt hvønn fyribyrgjandi týdning vakmyndatól yvirhøvur hava, og hesi støð mugu tí fyrst grundgeva við ítøkiligum trupulleikum, og vísa á og grundgeva fyri, hví tað er neyðugt at nýta vakmyndatól.“*

Dátueftirlitið hevur í 2008 viðgjørt vakmyndatól á 6 ymiskum úti- og náttarstøðum eftir hesum meginreglum.

4.1.2. INNLIT Í TRYGGINGARMÁL

Dátueftirlitið viðgjørdi eina klagu frá Føroya Lærarafelag, har kært varð um at Føroya Lívstrygging ikki hevði givið innlit í læknaligu skjølini o.a. í sambandi við tryggingarmálið hjá einum limi í Føroya Lærarafelag.

Grundgevingin fyri klaguni var, at tað var ikki møguligt hjá liminum at røkja síni áhugamál á nøktandi hátt, tí kunningin frá Føroya Lívstrygging ikki var nóg nágreinilig, og einki journalyvirlit fekst yvir skrásett skjøl. Føroya Lærarafelag var áhugað í læknaliga avgerðargrundarlagnum og hvørjir persónar og skjøl vórðu nýtt í sambandi við viðgerðina og avgerðina av tryggingarmálinum.

Føroya Lærarafelag førdi fram, at sjálvandi hevur tryggingartakarin rætt til at síggja egnar heilsuupplýsingar, hóast hesar eru trúnaðarupplýsingar. Eingir læknaligir myndugleikar hava loyvi at lata Lívstryggingini upplýsingar uttan við loyvi frá tryggingartakaranum.

Føroya Lærarafelag metti seg eisini hava rætt til onnur skjøl í málinum og førdi fram, at tað var ein misskiljing, at øll onnur skjøl vóru innanhýsis arbeiðsskjøl. Samb. vanligum reglum vóru skjøl, sum grundgeva og taka støðu í einum máli, ikki innanhýsis arbeiðsskjøl.

Føroya Lívstrygging førdi fram, at tá mett verður um tryggingarváða, verður biðið um heilsuupplýsingar frá t.d. læknum, sjúkrahúsum v.m. Heilsuupplýsingar eru trúnaðarmál, og tí verður avrit av skrivligari samtykkiváttan frá tryggingarsøkjandi send við umbønini og viðmerkt verður, at tað er ráðgevandi tryggingarlæknin, sum skal brúka upplýsingarnar.

Hóast ein tryggingarsøkjandi ella tryggjaður hevur rætt til journalinnlit, so metti Føroya Lívstrygging ikki, at heimildin til at geva hetta innlit liggur í teirra hondum. Vanlig mannagongd innan lívstryggingarvirksemi er, at innlit í upplýsingar í sjúk-

lingajournal og onnur læknalig skjøl einans verða givin gjøgnum læknan hjá tí tryggjaða.

**Málið varð viðgjørt á Dáturáðsfundi og varð hendan avgerð tikin:**

Viðv. Sjúklingajournalini hjá tryggingarsøkjandi:
Samanumtikið metir Dátueftirlitið, at avgerðin um at tryggingartakarin kann fáa innlit í sjúklingajournalina hjá sær, skal takast av *„den myndighed, institution eller sundhedsperson, der har patientjournalerne m.v. i sin besiddelse“,* samb. § 21 í Lov om patienters retsstilling. Soleiðis sum Dátueftirlitið tulkar § 21, vil hetta siga, at tað er sjúkrahúsið ella egin kommunulækni – og ikki Føroya Lívstryging – sum avger, um tryggingartakarin skal hava innlit í egna sjúklingajournal ella um ein partur av sjúklingajournalini møguliga skal dyljast fyri tryggingartakaranum samb. § 20 stk. 2 í Lov om patienters retsstilling.

Um so er, at tryggingartakarin ikki fær fult innlit í egna sjúklingajournal, eftir § 21 í Lov om patienters retsstilling, avmarkar hetta samsvarandi rættin til egið innlit eftir § 19 í persónsupplýsingarlógini.

**Samb. § 21, stk. 1, í Lov om patienters retsstilling, er tað tann myndugleiki, institutión ella heilsupersónur, sum hevur journalina hjá sær, sum avger um innlit skal gevast. Mett verður, at hetta eisini er galdandi, hóast journalin er útflýggjað Føroya Lívstrygging. T.v.s. at Føroya Lívstrygging hevur heimild at sýta fyri at geva innlit, og vísa til læknan hjá viðkomandi sum rætta myndugleika.**

Viðv. øðrum skjølum í tryggingarmálinum:
Føroya Lívstrygging metti, at skjøl sum m.a. ráðgevandi heilsulæknin hjá Føroya Lívstrygging nýtti sum grundarlag undir avgerðini í tryggingarmálinum, vóru fevnd av ásetingunum í § 22 í persónsupplýsingarlógini, og vóru tískil undantikin rættinum til innlit, m.a. tí at talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl.

Dátueftirlitið viðmerkti, at skjøl ella upplýsingar úr skjølum, sum hava verið grundarlag undir avgerðini og sum viðvíkja teim veruligu umstøðunum í málinum, kunnu ikki undantakast innliti við at vísa til, at talan er um innanhýsis arbeiðsskjøl hjá Føroya Lívstrygging. Hetta er somuleiðis galdandi fyri skjøl, sum eru gjørd av Føroya Lívstrygging, fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greiðleika viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum í einum máli.

Mett varð, at viðvíkjandi innliti í læknaligu upplýsingarnar og grundgevingunum fyri at gera fyrivarni í tryggingartreytunum, er persónsupplýsingarlógin galdandi og tryggingartakarin kann sostatt fáa innlit í hesar upplýsingar sbrt. § 19 í persónsupplýsingarlógini, um so er at viðkomandi fær fult innlit í sjúklingajournal sín.

**Ongin ivi er um at rætturin til innlit sambært § 19 í persónsupplýsingarlógini, skal tryggja at skrásetti fær so mikið av innliti í málið, sum er neygugt fyri at hann kann røkja síni áhugamál sbrt. § 19, stk. 2 í persónsupplýsingarlógini.**

**Hóast Føroya Lívstrygging metti, at trygg-**

**ingartakarin ikki hevur rætt til innlit, tí at talan er um innanhýsis arbeiðsskjøl, so má tryggingartakarin fáa so mikið av innliti í málið, sum er neyðugt fyri, at hann kann røkja síni áhugamál. Hóast skjølini eru innanhýsis arbeiðsskjøl, má tryggingartakarin tískil hava rætt til innlit í tær upplýsingar og grundgevingar, sum ráðgevandi heilsulæknin nýtir sum grundarlag undir avgerðini í hennara tryggingarmáli. T.v.s. at tryggingartakarin ikki neyðturviliga skal hava innlit í alt skjalið, men bert í neyðugu upplýsingarnar í skjølunum.**

4.1.3. KJAK.FO

Í samband við at Dimmalætting tók dátugrunnin www.kjak.fo úr nýtslu, fekk Dátueftirlitið ymiskar fyrispurningar m.a. um Dimmalætting kundi selja dátugrunnin.

Dátueftirlitið metti í hesum føri at innleggini, sum kjakarar hava skrivað á kjak.fo eru vard av reglum um skrivi- og talufrælsi og eru samb. § 6 stk. 1 í persónsupplýsingarlógini í stóran mun ikki fevnd av ásetingunum í lógini. Harafturat eru innleggini fyri tað mesta dulnevnd, og er talan tá ikki um viðgerð av persónsupplýsingum, og er tí heldur ikki fevnt av persónsupplýsingarlógini. Hinvegin metti Dátueftirlitið, at upplýsingarnar í umsitingarskipanini eru persónsupplýsingar og sostatt fevndar av reglunum í persónsupplýsingarlógini.

Dátueftirlitið fekk somuleiðis í hesum sambandi ein fyrispurning frá Føroya Landsbókasavni (FLB), um savnið kundi ogna sær dátugrunnin. FLB upplýsti fyri Dátueftirlitinum, at FLB hevði ongar ætlanir um at tilfarið skuldi gerast atkomuligt fyri almenninginum og at ætlanin var, at tað skuldi brúkast sum heimildartilfar til granskan av føroyskari søgu og samfelagsviðurskiftum, tó við teimum avmarkingum og reglum, ið eru galdandi fyri atkomu av persónseymum tilfari.

FLB vísti á, at tað serliga er tað almenna orðaskiftið á kjak.fo, sum hevur áhuga fyri FLB.

Dátueftirlitið svaraði FLB á hendan hátt:

*„Víst verður til bræv frá Føroya Landsbóksavnið til Dátueftirlitið, dagfest 17. oktober 2008, har biðið verður um viðmerkingar frá Dátueftirlitinum til, at Føroya Landsbókasavn ætlar at ogna sær dátugrunnin kjak.fo.*

*Soleiðis sum Dátueftirlitið skilir málið snýr tað seg um tilfar, sum einstaklingar hava lagt á internetið undir dulnevni. Dátueftirlitið leggur sostatt til grund, at tað snýr seg um upplýsingar sum eru anonymiseraðar og viðgerðin/víðarilatanin er sostatt ikki fevnd av reglunum í persónsupplýsingarlógini.*

Tað at Dimmalætting letur hesar upplýsingar, sum hava verið at síggja á heimasíðuni www.kjak.fo víðari til Føroya Landsbókasavn er ikki nakað sum er fevnt av reglunum í persónsupplýsingarlógini, men sum Dátueftirlitið skilir málðr, so liggja ein røð av upplýsingum aftanfyri í umsitingarpartinum av skipanini, har fólk m.a. hava skrásett sítt dulnevni og sent persónlig boð millum sín. Hesar upplýsingar kunnu knýtast at ávísum persónum og eru tí fevndar av persónsupplýsingarlógini sbrt § 3 í lógini.

*Í samband við at skipanin verður latin Føroya Landsbókasavni, metir Dátueftirlitið tað vera eitt krav, at upplýsingarnar í umsitingarpartinum av skipanini skulu strikast ella í minsta lagi dulnevnast, so at ikki ber til at finna fram til persónarnar aftanfyri dulnevnini. Hetta krav er ikki galdandi um so er at endamálið við nevndu gransking í tilfarinum ikki kann røkkast.*

*Víst verður somuleiðis til reglurnar um kt-trygd í Trygdarkunngerðini."*

4.1.4. HØVDAVIRKIÐ
Samtak kærdi tann 28. mars Høvdavirkið í Leirvík fyri Dátueftirlitinum og førdi fram, at Høvdavirkið nýtti vakmyndatól til at hava eftirlit við starvsfólkunum. Dátueftirlitið sendi kæruna til viðmerkingar hjá Høvdavirkinum tann 2. apríl 2008 og vísti somuleiðis á, at sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini og § 1, stk. 3 í kunngerð um fráboðanarskyldu, skal viðgerð av persónsupplýsingum við vakmyndatóli fráboðast Dátueftirlitinum.

Tann 9. mai 2008 fekk Dátueftirlitið fráboðan frá Høvdavirkinum um viðgerð av persónsupplýsingum við vakmyndatóli og tann 14. mai 2008 setti Dátueftirlitið nakrar ítøkiligar spurningar til fráboðanina frá Høvdavirkinum og bað somuleiðis um undirskrivað váttanaraskriv. Tann 28. mai 2008 bað Høvdavirkið um fund við Dátueftirlitið fyri at greiða nærri frá upplýsingunum í fráboðanini og skeyt upp, at fundurin varð hildin á Høvdavirkinum, so Dátueftirlitið somuleiðis kundi síggja, hvussu vakmyndatólini verða nýtt í tí dagliga arbeiðinum á virkinum.

Fundurin varð hildin tann 13. juni á Høvdavirkinum og endamálið við fundinum var at fáa greiði á, hvussu nógv vakmyndatól Høvdavirkið hevði, hvussu hesi verða nýtt, herundir um tey verða nýtt til starvsfólkaeftirlit og at fáa greiði á ymiskum spurningum í samband við fráboðanina frá Høvdavirkinum.

Á fundinum varð greitt frá, at talan er um tvey sløg av vakmyndatólum. Tað eina slagið eru tól, sum eru sett upp við maskinurnar, hesi goyma ikki myndirnar, tær verða vístar á skermi, sum stendur við maskinurnar og á einum skermi á trukkinum. Endamálið við hesum vakmyndatólum er at síggja produktiónslinjuna og tryggja, at vøra ikki dettur av bandinum o.a. so at tey fólk, sum ansa maskinunum, kunnu ferðast millum maskinurnar. Ongi starvsfólk standa við eina maskinu allan dagin. Tað eru 6 vakmyndatól av hesum slagi, herav kunnu fólk vísast á tveimum. Hesar myndir verða ikki goymdar, men verða nýttar sum arbeiðsamboð á staðnum.

Hitt slagið av vakmyndatólum eru vanlig vakmyndatól, har myndirnar verða goymdar í uml. 7-10 dagar. Hesi eru sett upp ymsa staðni á virkinum, serliga við út- og innhurðar og eru 13 í alt:

Greitt varð frá, at tað byrjaði við onkrum hendingum við stuldri av vøru (olju og turrum fiski) og eini roynd at gera herverk á útgerðina á skrivstovuni. Víst varð á, at virkið liggur avsíðis og tí er neyðugt við vaktarhaldi bæði fysiskum og vakmyndatólum fyri at tryggja ognirnar hjá virkinum og framleiddu vøruna, eins og neyðugt er at tryggja móti stuldri og fyribyrgja herverk o.a.

Upplýst varð, at skermurin har myndirnar verða vístar á, er í „servararúminum“ og at tað bara eru Ansni og dagligi leiðarin á Høvdavirkinum, sum hava loyniorð til skipanina. Teldan er ikki koblað á netið, og tað er ikki ofta at hugt verður eftir upptøkunum. Hetta verður bara gjørt, um so er, at onkur hending verður fráboðað, sum ger at tørvur er á at kanna upptøkurnar.

Somuleiðis varð greitt frá, at vakmyndatólini verða ikki nýtt til starvsfólkaeftirlit, at starvsfólkini eru kunnað um vakmyndatólini, at upptøkurnar verða strikaðar eftir í meðal 9 døgum og at tær verða yvirskrivaðar. Trygdarreglur eru galdandi, og ítøkilig dømi vórðu nevnd.

Undir viðgerðini av málinum legði Dátueftirlitið dent á, at talan er um eitt arbeiðspláss, har starvsfólk hava krav uppá persónsvernd, og atlitið til persónsverndina hjá starvsfólki vigar tungt eins og tað ger á øðrum arbeiðsplássum. Dátueftirlitið legði somuleiðis dent á, at mett verður at vakmyndatól í stóran mun eru skerjandi fyri persónliga frælsið, og at vakmyndatól tí eiga at verða nýtt við størsta varsemi og bara tá tað er neyðugt. Heimildin til at nýta vakmyndatól skuldi í hesum føri finnast í § 9, stk. 1 nr. 6, *„av røttum at kunna fylgja einum sjálvsagt heimilaðum áhugamáli hjá dátuábyrgdaranum ella tí triðjapersóni, sum hevur fingið persónsupplýsingarnar, og fyrilitini fyri skrásetta ikki eru eins stór og hesi áhugamál“.* Henda áseting hevur við sær, at metast skal um arbeiðsgevarin av røttum kann fylgja einum sjálvsagt heimilaðum áhugamáli, og fyrilitini fyri arbeiðstakaran ikki eru eins stór og hesi áhugamál.

Í ítøkiliga førinum varð mett, at atlitini hjá arbeiðsgevaranum, sum eru at tryggja arbeiðsgongdina á virkinum, tryggja rávøru og framleidda vøru, krøv uttanífrá um sporføri o.a., saman við atlitinum til herverk og stuldur viga tungt, og tí skal metast um bágin, tann einstaki arbeiðstakarin skal tola í hesum føri, vigar minni.

Tá hugt verður eftir, hvat myndirnar á teimum 13 vakmyndatólunum vísa, sæst, at tær í stóran mun vísa lutir heldur enn persónar. Hetta eru plattar við vøru, kassar og út- og inn hurðar. Persónar koma bara á myndirnar, tá teir t.d. koma inn og út gjøgnum hurðar, og tá teir m.a. leggja vøru niður í kassar. Á vakmyndatóli nr. 9, har arbeiðsfólkið stendur við arbeiðsborðini er myndin upplýst, á tí síðuni har fólkið stendur, so tað ikki ber til at síggja persónarnar. Mett verður tískil, at bágin, tann einstaki skal tola, er avmarkaður so mikið, at atlitini til áhugamálini hjá arbeiðsgevaranum í hesum føri viga tyngri.

Hetta saman við meginreglunum í § 8, sum millum annað áseta, at upplýsingarnar bert verða savnaðar saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál og at upplýsingarnar bert verða viðgjørdar, um

tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkka endamálinum, metir Dátueftirlitið, at Høvdavirkið lýkur treytirnar fyri at fremja ávíst eftirlit við vakmyndatóli.

Tá hugt verður eftir myndunum á teimum 6 vakmyndatólunum sum ikki goyma, so ger tað sama seg galdandi, sum nevnt omanfyri. Hesar myndirnar vísa í stóran mun lutir heldur enn

persónar. Hesar myndirnar verða harafturat ikki goymdar og kunnu bert síggjast á staðnum har skermarnir eru, umframt í einum trukki. Mett verður tískil, at bágin, tann einstaki skal tola, er avmarkaður so mikið, at atlitini til áhugamálini hjá arbeiðsgevaranum í hesum føri viga tyngri.

Dátueftirlitið kom tí til hesa niðurstøðu:

***„Avgerð***
*Vísandi til omanfyristandandi skal verða sagt frá, at Dátueftirlitið metir vakmyndatólini hjá Høvdavirkinum vera heimilað sbrt. § 8 jf. § 9, stk.1 nr 6 í persónsupplýsingarlógini. Ein fyritreyt er tó, at tey bara verða nýtt til fráboðaðu endamálini og at tey annars halda reglurnar í persónsupplýsingarlóggávuni.*

*Sambært § 1 stk. 1 í TV-overvågningsloven[1], hava privat ikki heimild til at gera vakmyndatólsupptøkur av „gade, vej, plads eller lignende område, som benyttes til almindelig færdsel.“ Vakmyndatólið nr. 4, vísur ein part av vegnum út til brennistøðina hjá IRF. Hetta vakmyndatólið er tískil ikki í samsvar við TV-overvågningslógina og má vegurin blendast ella vinkulin broytast“*

Dátueftirliitð setti somuleiðis hesar treytir til trygdina:

Dátueftirlitið skal boða frá, at nøktandi fráboðan er móttikin um viðgerð við vakmyndatóli. Gjørt verður vart við at nýggj fráboðan skal latast Dátueftirlitinum sbrt. § 32, stk. 3 í persónsupplýsingarlógini, um viðgerðin verður broytt ella fer út um karmarnar í áður galdandi fráboðan.

*Umframt at viðgerðin formliga skal fráboðast Dátueftirlitinum, skal viðgerðin til eina og hvørja tíð lúka treytirnar í lóggávuni og merkir hetta m.a., at vigerðin skal verða kunnað. Viðskiftafólk skulu verða kunnaði við skelting, og starvsfólk skulu hava gjølliga kunning á starvsfólkafundi, í starvsfólkahondbók ella á tann hátt starvsfólk vanliga verða kunnað á viðkomandi arbeiðsplássi.*

*Dátueftirlitið hevur, út frá persónsupplýsingarlógini, gjørt eina vegleiðing í samband við viðgerð av persónsupplýsingum við vakmyndatóli. Vísast skal á, at viðgerðin við vakmyndatóli skal vera í samsvari við reglurnar í vegleiðingini, sum er hjáløgd hesum brævi.*

Dátueftirlitið ger somuleiðis vart við, at tað er skyldan hjá dátuábyrgdaranum at tryggja, at viðgerðin til eina og hvørja tíð er í samsvari við reglurnar í persónsupplýsingarlógini. Tað er skylda dátuábyrgdarans *við væl skipaðum tiltøkum at tryggja, at viðgerðin av upplýsingunum nøktar tær treytir, ið Trygdarkunngerðin[2] setir. Víst verður millum annað til, at teknisk og fyriskipanarlig tiltøk skulu tryggja, at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til persónsupplýsingarnar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær. Hetta merkir í høvuðsheitum, at upptøkurnar bara skulu goymast í 7 dagar, at óviðkomandi ikki skulu hava atgongd til upptøkurnar, at skeltað skal vera við at vakmyndatól eru á økinum og*

1 Lov nr. 278 af 9. juni 1982 om forbud mod privates tv-overvågning m.v., som sat i kraft ved kongelig anordning nr. 155 af 21. marts 1988

2 Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

*somuleiðis skulu upptøkurnar vera á teldu, sum er í bygninginum, og teldan skal ikki hava internetatgongd.*

*Vísast skal eisini á, at Dátueftirlitið er eftirlitsmyndugleiki á økinum. Dátueftirlitið hevur tískil heimild til at koma á eftirlitsvitjan sambært § 40, stk. 1 og 2 í persónsupplýsingarlógini og kanna eftir, um viðgerðin við vakmyndatólum er í samvar við persónsupplýsingarlógina."*

4.1.5. BANDAÐAR TELEFONSAMRØÐUR

Dátueftirlitið fekk í mars 2008 ein fyrispurning frá Føroya Banka um bandaðar telefonsamrøður. Spurt varð um peningastovnurin kundi upptaka allar telefonsamrøður viðv. virðisbræva- og valutahandli og ordrum, og hetta fevnir bara um telefonir við sonevnd „dealaraborð".

Peningastovurin upplýsti, at hetta er vanlig mannagongd aðrastaðni og vísti m.a. á, at allar samrøður við útlendskar bankar verða upptiknar av teimum útlendsku bankunum. Hetta verður roknað sum ein sjálvfylgja fyri at kunna avvikla handil skjótt og trygt yvir telefonina.

**Dátueftirlitið hevði hesar viðmerkingar**

*Persónsupplýsingarlógin*

Persónsupplýsingarlógin (Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004), er galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum fyri privat og fyri tað almenna, um viðgerðin er heilt ella lutvíst elektronisk ella um persónsupplýsingar eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um viðgerðin ikki er elektronisk, sbrt. § 3 stk. 1.

Í persónsupplýsingarlógini § 2, nr. 1 verður persónsupplýsing allýst sum *„Einhvør upplýsing og meting knýtt at einum ávísum likamligum persóni".* Ein viðgerð verður allýst sum *„Øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, goyming, víðarigeving, avhending v.m. ella ein sameining av hesum, líkamikið um henda er elektronisk ella ikki",* sbrt. § 2, nr. 2 í persónsupplýsingarlógini.

Dátueftirlitið kann staðfesta, at upptøka av telefonsamrøðum millum persónar, sum kunnu eyðmerkjast, er fevnd av persónsupplýsingarlógini.

Dátueftirlitið leggur til grund, at omanfyri nevnda upptøka av inn- og útgangandi telefonsamrøðum er fevnd av persónsupplýsingarlógini, og at málið tískil skal viðgerast eftir hesi lóg.

*Viðgerð*

Í § 8 í persónsupplýsingarlógini eru meginreglurnar fyri viðgerð av persónsupplýsingum ásettar. Hetta eru treytir, sum dátuábyrgdarin altíð skal lúka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Í greinini verður millum annað ásett, at persónsupplýsingar bert skulu savnast saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð skal samsvara hesum endamáli. Harafturat skulu persónsupplýsingar bert viðgerast, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkka endamálinum. Persónsupplýsingar skulu ikki verða nýttar til endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki.

Umframt reglurnar í § 8 skal ein viðgerð altíð

lúka eina treyt í § 9 er talan um viðgerð av ikki viðkvæmum upplýsingum. Snýr tað seg um viðgerð av viðkvæmum upplýsingum skal viðgerðin umframt krøvini í § 8 lúka eitt av krøvunum í § 9 og eitt av krøvunum í § 10.

Dátueftirlitið leggur til grund, at omanfyri nevndu avtalur, sum verða gjørdar við dealaraborðini, er viðgerð av ikki viðkvæmum persónsupplýsingum, og treytin fyri at Føroya Banki kann taka upp omanfyri nevndu telefonsamrøður gjørdar frá telefonum við dealaraborðini er sostatt, at Føroya Banki lýkur allar treytirnar í § 8 og harafturat hevur eina heimild í § 9 at vísa á.

Í § 9 verður millum annað ásett, at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast, um tann skrásetti hevur givið sítt samtykki, um viðgerðin er heimilað í lóg, ella um viðgerðin er neyðug. Viðgerðin kann vera neyðug av ymiskum orsøkum, og eru seks ymiskar orsøkir settar upp í § 9.

Dátueftirlitið hevur í hesum føri viðgjørt, um ein banki við heimild í § 9, stk. 1, nr. 6 uttan samtykki frá skrásetta kann taka upp telefonsamrøður, sum verða gjørdar við telefonum frá dealaraborðunum, og sum verða gjørdar fyri at gera avtalur við valuta, partabrøvum, obligatiónum og øðrum fíggjarligum tænastum.

Dátueftirlitið hevur í viðgerðini lagt dent á, at bankin hevur áhuga í seinni at kunna prógva, um ein avtala er gjørd og møguliga at rætta feilir og tílíkt í avtaluni. Somuleiðis hevur Dátueftirlitið lagt dent á at felagið „Lokale Pengeinstitutter", har allir føroyskir peningastovnar eru limir, hevur upplýst, at tað er vanligur handilssiður í hesi vinnugrein at taka upp telefonsamrøður fyri at kunna skjalfesta og prógva ymiskar avtalur.

*Niðurstøða*

*Dátueftirlitið kann staðfesta, at Føroya Banki við heimild í § 8 og § 9, stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini kann taka upp telefonsamrøður gjørdar frá dealaraborðunum viðv. virðisbræva- og valutahandli.*

*Dátueftirlitið vil í hesum føri gera vart við, at tað er ein treyt at starvsfólkini eru kunnaði um, at hesar samrøður verða tiknar upp, og at starvsfólkini hava atgongd til aðrar telefonir, har samrøðurnar ikki verða tiknar upp.*

*Somuleiðis er tað umráðandi, at starvsfólkini verða vard á tann hátt, at tað eru greiðar reglur t.d. í innanhýsis mannagongdum um, hvør hevur rætt til at avlurta samrøðurnar, og á hvønn hátt ein tílík avlurting verður framd.*

*Bankin skal somuleiðis kunna viðskiftafólk bankans á sjónligum stað um, at hesar samrøður verða tiknar upp.*

*Dátueftirlitið skal at enda upplýsa, at reglur eru í § 263, stk. 1, nr. 3 í revsilógini um at taka upp samrøður millum onnur. Hetta eru ikki reglur, sum Dátueftirlitið umsitur, og svarið hjá Dátueftirlitinum fevnir bara um reglurnar í persónsupplýsingarlógini.*

## 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

### 4.2.1. VEVMYNDATÓL

Dátueftirlitið gjørdi í juni 2008 av at taka upp

nøkur mál um vevmyndatól. Dátueftirlitið kannaði tískil 18 ymisk vevmyndatól, sum lógu á netinum og gjørdi av at senda brøv til 10 av hesum vevmyndatólsánarum. Brævið varð sent til teir vevmyndatólsánarar, har Dátueftirlitið metti vevmyndatólini vera á markinum fyri, hvat er loyvt sambært persónsupplýsingarlógini og bað hesar upplýsa um endamálið við vevmyndatólinum, um upptøkurnar verða goymdar og um mett varð, at persónar kundu eyðmerkjast á myndunum.

Orsøkin til at Dátueftirlitið tók hesi mál upp var bæði, at tað komu fyrispurningar frá fólki um tey ymisku vevmyndatólini á netinum vóru lóglig, og eisini tí tað var rættiliga lætt hjá Dátueftirlitinum at kanna eftir, tí nógv av vevmyndatólunum liggja sjónlig á portalinum www.olivant.fo.

Vevmyndatól er tað føroyska orðið fyri „webcamera", og endamálið er oftast at vísa myndir av slagnum „hvussu er veðrið í dag?". Í persónsupplýsingarlógini, sum Dátueftirlitið umsitur eru ymiskar reglur fyri nýtslu av vevmyndatólum og m.a er ásett, at myndirnar bara kunnu liggja á internetinum, um so er at persónar ikki kunnu kennast aftur.

<u>Brævið var sent til hesi støð:</u>

Vinnuháskúlan
Føroya Tele
Runavíkar kommunu
Leirvíkar kommunu
Hotel Tórshavn
Fuglafjarðar kommunu
Tryggingarfelagið Føroyar
Sunda kommunu
Fólkaflokkin
Landsverk

Flestu vevmyndatólsánarar svaraðu brævinum frá Dátueftirlitinum og svørini vóru viðgjørd á Dáturáðsfundi tann 18. september 2008.

Niðurstøðan á fundinum var, at Dáturáðið metti, *„at tað ikki kann útilokast at tað ber til at eyðmerkja persónar á hesum myndum, og Dátudo ráðið metir, at hetta hevur við sær, at persónliga frælsið og heimafriðurin hjá tí einstaka verður gingið ov nær, og at persónsupplýsingar tí ikki verða viðgjørdar við virðing fyri persónliga frælsinum og heimafriðinum, soleiðis sum ásett í § 1 í persónsupplýsingarlógini. Dáturáðið ger vart við at eitt vevmyndatól er vanliga ætlað til at vísa veðrið ella tílíkt á einum ávísum øki. Um so er at tað ikki ber til at eyðmerkja ella kenna* ***persónar*** *aftur, ber til at hava tílík vevmyndatól, og tað er ikki í stríð við persónsupplýsingarlógina at vísa upptøkurnar á internetinum. Men um so er, at persónar kunnu kennast aftur, skulu upptøkurnar viðgerast eftir reglunum um vakmyndatól. Vanliga verður ikki góðtikið, at vakmyndatólsupptøkur verða vístar á internetinum uttan so at tey, sum eru á upptøkunum, hava givið sítt samtykki."*

Dáturáðið tók í hesum føri avgerð um, at 9 av hesum vakmyndatólsánarum skuldu antin snara myndunum, zooma út ella finna aðra tekniskar loysnir, sum høvdu við sær at einstaklingar ikki skuldu kunna eyðmerkjast. Ráðið metti at hesar broytingar komu ikki at hava avleiðingar fyri endamálið, sum framvegis kundi røkkast við broyttu myndunum.

Vevmyndatólsánararnir vóru bidnir um at boða Dátueftirlitinum frá, tá omanfyri nevndu broytingar vóru framdar og við árslok 2008 høvdu 7 vevmyndatólsánarir boðað frá, at viðurskiftini vóru komin í rætt lag. Sostatt vóru 2 vevmyndatólsánarar, sum ikki høvdu fingið viðurskiftini í rætt lag við árslok 2008, og Dátueftirlitið arbeiðir víðari við hesum málum komandi ár.

4.2.2. VAKMYNDATÓL

Eitt annað mál, sum Dátueftirlitið tók upp av egnum ávum var eitt mál um vakmyndatól hjá Føroya Shell. Umvegis fjølmiðlarnar kom tað fram, í samband við eitt mál um stuldur av bensini, at Shellstøðini á Frælsinum nýtti vakmyndatól. Av tí at Dátueftirlitið onga fráboðan hevði fingið frá Føroya Shell um vakmyndatól á Shellstøðini á Frælsinum í Havn, setti Dátueftirlitið seg í samband við Føroya Shell og bað teir um at fáa viðurskiftini í rætt lag.

4.2.3. STØÐ VIÐ SKEINKILOYVI

Dátueftirlitið sendi tann 30. mai 2008 bræv til øll støð, sum høvdu skeinkiloyvi, og gjørdi vart við at nýggjar reglur vóru á vakmyndatólsøkinum, og at øll hesi støð sum nýta vakmyndatól nú skulu fráboða Dátueftirlitinum hesi.

Orsøkin til at Dátueftirlitið tók hetta mál upp var bæði at broytingar vóru gjørdar í 2007 í kunngerðunum nr. 30, 31 og 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, soleiðis at fráboðanarskylda nú er til Dátueftirlitið tá vakmyndatol verða nýtt, men eisini tí at Dáturáðið hevði viðgjørt nøkur ítøkilig mál um vakmyndatól á úti- og náttarstøðum og var komið til eina niðurstøðu á hesum økinum frammanundan.

Dátueftirlitið sendi bræv til hesi 50 úti- og náttarstøð:

Hotel Tórshavn – Hvonn
Gourmet
Kliché
Cippo
Hotel Føroyar
Marco Polo
Toscana
Norðurlandahúsið
Merlot
Roykstovan í Kirkjubø
Havnar Klubbi
Williams í SMS
Mimir
Tórshøll
Eclipse
Bowlinghøllin Nantong
Pizza 67
Rex
Rio Bravo
Kaffistovan í Nólsoy
Galleri Jinx
Fjørukrógvin
Hotel Eiði
Muntra í Fuglafirði
Sp/f Café-Inn
Mentanarhúsið í Fuglafirði
Bowlinghøllin í Leirvík
Blikk Caféin í Saltangará
Gjáargarður
Sp/f Við Hús í Satangará
Hotel Vágar

Kristianshús í Mykinesi
Cafeteria á flogvøllinum
Restaurant Multitænastan, Sandoy
Texas, Sandoy
Stóra Pakkhús
Krambúðin hjá Thomsen
Hotel Bakkin
Hotel Tvøroyri
Hotel Øravík
Broadway, Vági
Barok
Hotel Norð, Viðareiði
Klaksvíkar Klubbi
Roykstovan
Hereford
Sp/f Jenny, Viðareiði
Mawerick, Klaksvík

Dátueftirlitið gjørdi somuleiðis í brævinum vart við, at tað er brot á persónsupplýsingarlógina ikki at fráboða Dátueftirlitinum viðgerð av persónsupplýsingum við vakmyndatóli, og at Dátueftirlitið er eftirlitsmyndugleiki á økinum og tískil hevur heimild at koma á eftirlitsvitjan sambært § 40, stk. 1 og 2 í persónsupplýsingarlógini og kanna eftir, um viðgerðin við vakmyndatólum er í samsvari við persónsupplýsingarlógina.

# 5 Altjóða samstarv

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF frá 24.10.1995 um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu frítt flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES-nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES-londini gera og á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond. Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og tey londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Somuleiðis søkti Innlendismálaráðið í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Arbeitt hevur verið við málinum í longri tíð, og arbeiðið er nú komið væl áleiðis, men bíðað verður framvegis eftir at fáa endaliga góðkenning frá ES-nevndini.

## 5.1. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Føroyum, Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum.

Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á árligu málsviðgerafundunum millum norðurlendsku dátueftirlitini. Á hesum fundum eru framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak.

Á árliga norðurlendska málsviðgerafundinum, sum í 2008 varð hildin í Stokholm luttóku umboð fyri Dátueftirlitið. Á fundinum vóru ymisk áhugaverd evnið viðgjørd, m.a.:

- Økta nýtslan av vakmyndatólum í norðanlondunum og uppgávan hjá Dátueftirlitunum í hesum sambandi
- Persónsupplýsingar og talu- og skrivifrælsið á internetinum
- Møguleikar hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti við almennar myndugleikar umvegis internetið.

Dátueftirlitið metir, at tað hevur stóran týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra nógv av londunum rundanum okkum. Londini hava havt lóggávu á hesum økinum longri enn vit hava í Føroyum, og tey kenna tí oftast teir trupulleikar vit stríðast við, og kunnu vísa á ymiskar loysnir, sum tey hava nýtt.

Á fundinum var avgjørt at Føroyar skulu vera vertir fyri Norðurlendska fundinum í 2009.

# 6 Eftirlitsvitjanir í 2008

Dátueftirlitið var í 2008 á eftirlitsvitjan á 8 støðum. Talan var um fyrstu eftirlitsvitjan í 4 ár. Hetta var gjørligt, eftir at Løgtingið hevði hækkað játtanina hjá Dátueftirlitinum, so at Dátueftirlitið kundi keypa sær serkøna hjálp til at fremja tekniskt eftirlit.

Niðanfyri er ein samandráttur av eftirlitsvitjanunum. Víst verður annars til frágreiðing frá eftirlitsvitjanunum, sum liggur á heimasíðuni www.datueftirlitid.fo

6.1. EFTIRLITSVITJAN VIÐV. VAKMYNDATÓLUM
Tann 29. oktober 2008 framdi Dátueftirlitið fráboðað eftirlit á 5 støðum, har dentur var lagdur á vakmyndatól. Talan var um trý dansistøð í Tórshavn, Rex, Eclipse og Havnar Klubba, eina restauratión í Tórshavn, Marco Polo og eina bensinstøð, Statoilstøðina á Argjum.

Komið varð fram á tilsamans 22 vakmyndatól á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Rex | 0 |
| Eclipse | 0 |
| Havnar Klubbi | 4 |
| Marco Polo | 4 |
| Statoilstøðin á Argjum | 14 |

Umboðini fingu á staðnum boð um at fráboða vakmyndatólini til Dátueftirlitið sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31. frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007. Í teimum førum, har dátuviðgeri varð nýttur, fingu umboðini boð um at senda Dátueftirlitinum avrit av skrivligari avtalu við dátuviðgeran.

Harafturat gav Dátueftirlitið millum annað tilráðingar um, at greiðar mannagongdir skulu vera fyri, nær hyggjast skal eftir upptøkunum, og hvussu farast skal fram í sambandi við, at tær verða nýttar til eitthvørt lógarheimilað endamál. Eisini varð mælt til, at tað altíð verður loggað av skipanini, tá farið verður frá telduni.

Dátueftirlitið vísti á týdningin av at hava skjalfestar mannagongdir, av tí at góðar og skynsamar mannagongdir hava tað við at missa bitið sum frá líður, um hesar ikki eru niðurskrivaðar.

Mælt var til at starvsfólkini fingu formliga kunning um vakmyndatólini og leiðbeining um, hvussu og nær upptøkurnar verða nýttar.

Skeltir skulu setast upp við inngongdirnar um at vakmyndatól eru á staðnum.

Í nøkrum føri kravdi Dátueftirlitið, at ávís vakmyndatól skuldu snarast soleiðis, at hvørki viðskiftafólk ella starvsfólk vóru undir støðugum eftirliti.

6.2. EFTIRLITSVITJAN HJÁ BARNAVERNDARSTOVUNI

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 29. oktober 2008 á Barnaverndarstovuni í Tórshavn.

Barnaverndarstovan fekk millum annað boð um, at senda Dátueftirlitinum fráboðan frá Barnaverndarstovuni um flutning av persónsupplýsingum til útlond. Harafturat skal Barnaverndarstovan senda Dátueftirlitinum avrit av skrivligari avtalu við dátuviðgeran. Í avtaluni skal eisini greiðast frá, hvussu Barnaverndarstovan heldur eftirlit við kt-trygdini hjá Tórshavnar Kommunu, sum er dátuviðgeri hjá Barnaverndastovuni.

Dátueftirlitið skal hava frágreiðing frá Barnaverndarstovni um, á hvønn hátt persónsupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdara, verða tryggjaðar á nóg góðan hátt, har trúnaður er neyðugur sbrt. § 11, stk. 3 í Trygdarkunngerðini.

Dátueftirlitið mælti til at hava niðurskrivaðar mannagongdir. Mælt var í hesum sambandi til serliga at hava niðurskrivaðar mannagongdir um:

- útvegan av nýggjari útgerð
- stýring av brúkararættindum
- at skriva út og at burturbeina pappírstilfar (print, makulering)
- handfaring av elektroniskum flutningsmiðlum (viðkvæmar upplýsingar í t-posti)
- um fysisku trygdina á staðnum (steingja av og læsa rúm og goymslur)

Mælt varð somuleiðis til, at starvsfólkini fingu formliga kunning um hesar mannagongdir.

6.3. EFTIRLITSVITJAN HJÁ DEILDINI FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU (DFAA)

Dátueftirlitið framdi tann 30. oktober 2008 fráboðað eftirlit hjá DFAA í Tórshavn. Endamálið við eftirlitinum var at kanna kt-trygdina á staðnum.

Umboð fyri DFAA greiddi frá, at DFAA hevur innanhýsis trygdarreglur, sum eru niðurskrivaðar. Stjórin á DFAA hevur ábyrgdina av trygdarreglunum og av at dagføra reglurnar. Upplýst var at trygdarreglurnar taka støði í trygdarkunngerðini og teimum etisku krøvunum, sum eru innanfyri heilsuverkið.

Dátueftirlitið metti at DFAA arbeiðir skipað og miðvíst við fysisku, logisku og fyriskipanarligu trygdini fyri at tryggja trúnaðin í skrásettu upplýsingunum hjá DFAA. Somuleiðis vóru tvey skjøl (Trygdarrreglur fyri DFAA og Trúnaðarskjal) við niðurskivaðum reglum og mannagongdum um

trygdina á staðnum, har somuleiðis árlig trygdarskoðan er ásett. Eingi absolut krøv vóru sett DFAA á staðnum.

Dátueftirlitið mælti til at hava niðurskrivaðar mannagongdir. Mælt varð í hesum sambandi til serliga at hava niðurskrivaðar mannagongdir um:

- Tá fólk koma og fara úr starvi
- At skriva út pappírstilfar (print)

- At burturbeina pappírstilfar (makulering og avfall)

Upplýst varð at umsiting av brúkararættindum stundum verður gjørd við støði í telefonboðum, og at hetta ikki altíð verður skjalfest. Dátueftirlitið mælir í hesum sambandi til, at umsiting av brúkararættindum altíð verður skjalfest, hetta er galdandi bæði tá nýggir brúkarar verða stovnaðir og tá brúkararættindi verða broytt.

Mælt varð somuleiðis til at hava regluligt eftirlit við brúkararættindum, soleiðis at tryggjað verður at bara autoriseraðir persónar hava atgongd til upplýsingar. Hetta eftirlit skal tryggja at rætt verður farið fram og at einki verður gloymt, tá fólk fara úr starvi ella í samband við innanhýsis starvsflytingar.

### 6.4. EFTIRLITSVITJAN Í FISKIMÁLARÁÐNUM

Dátueftirlitið framdi tann 30. oktober 2008 fráboðað eftirlit í Fiskimálaráðnum í Tórshavn.

Endamálið við eftirlitinum var fyrst og fremst at kanna viðurskifti, sum hava við starvsfólk at gera.

Í Fiskimálaráðnum starvast umleið 25 fólk.

Samanumtikið var heildarfatanin, at tað verður arbeitt við at betra um kt-trygdina og kunningartøkni sum arbeiðsamboð. Fiskimálaráðið hevur ein kt-politik og ein kt-trygdarpolitikk og arbeitt verður við at gera fleiri mannagongdir og vegleiðingar á økinum. Somuleiðis hevur ráðið sjálvt tikið stig til at broyta, hvør ið skal hava atgongd til ymisk sløg av málum.

Eftirlitið vísti, at starvsfólkini eru lítið kunnaði um trygdarreglur – herundir tagnarskyldu, og á hvønn hátt Fiskimálaráðið viðger upplýsingar um starvsfólkini. Hóast Fiskimálaráðið hevur kt-politik, kt-trygdarpolitik og starvsfólkahondbók og aðrar vegleiðingar, so var tað einki sum týddi uppá, at starvsfólk vóru kunnaði um hetta. Dátueftirlitið metti tískil ikki, at hetta arbeiðið verður raðfest nóg ovarliga, so at tað nøktar tørvin sum nútímans samfelag setur og krøvini í persónsupplýsingarlóggávuni.

Dátueftirlitið metir ikki, at tað verður arbeitt skipað og miðvíst við kt-trygdini á staðnum og ábendingar eru um, at leiðslan ikki raðfestur hendan partin av kt-arbeiðinum nóg høgt. Fiskimálaráðið hevur ikki eina formaliseraða og skipaða trygdarleiðslu, sum trygdarkunngerðin[3] ásetur.

Dátueftirlitið vísti á, at tað er leiðslan, sum hevur ábyrgdina av, at ásetingarnar í Trygdarkunngerðini verða fylgdar. Arbeiðið við kt-trygd snýr seg í stóran mun um at gera mannagongdir, vegleiðingar og skjalfestingar, og tað er tískil neyðugt at seta tíð og orku av til hetta arbeiðið, soleiðis at lóggávan á økinum verður fylgd.

3 Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.